# - Miðlahúsið, hvar



*- Eg skal ikki læsa meg inni á einari skrivstovu og sita har og ráða. Harafturímóti er tað mín uppgávu at seta røttu fólkini saman, at sparra og koma við afturmeldingum, sigur Annika Mittún Jacobsen*

**Eins ókend í miðlaheiminum, eins lítið kennir komandi kringvarpsstjórin eftir øllum at døma hendan heimin, sum hon frá 1. apríl skal starvast í.**
**– Mín greiða styrki er á leiðsluøkinum, har eg meti meg hava nógv at geva, sigur Annika Mittún Jacobsen við Sosialin**

MIÐLAR
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Samlaði føroyski miðlaheimurin varð fullkomiliga tikin av bóli um middagsleitið í gjár, tá tíðindakvinnan Óluvá Zachariassen í Kringvarpinum kunngjørdi, at stýrið fyri stovnin hevði gjørt av at seta Anniku Mittún Jacobsen í starv sum nýggjur stjóri í Kringvarpi Føroya.

Í opna landslagnum her á redaktiónini gingu nakrir ping-pong-minuttir .. familju av Selatrað og Fuglafirði.. búði á Oyrasundi.. menningarleiðari hjá Eik.. maðurin er finni.. eigur tvey børn.. okey, javel, aha.. og so ein rúgva av gitingum um, hví stýrið munda hava valt júst hana at standa á odda fyri einum av troyttastu almennu stovnunum í landinum.

Tí, eins ókend hon er í miðlaheiminum, eins lítið kennir hon eftir øllum at døma eisini til hendan heimin, sum hon frá 1. apríl kemur at starvast í. Hetta avdúkaði hon longu í fyrstu telefonsamrøðuni við undirritaðu, eina lítla løtu eftir at tíðindini bórust.

- Miðlahúsið – hvar er tað? Er tað harúti við Müllers Pakkhús?

- Nei, yvirav Hvonn!

## Nýtt og øðrvísi

Gitingarnar hava annars verið nógvar. Og blaðmaðurin á Portalinum hevði longu skrivað væl niðurfyri um sjálvsagdar kandidatar: "Tað verður ein av tungu dreingjunum í føroyskum vinnulívið, sum fer at stjórna kringvarpinum komandi fimm árini". Og so ein tóm linja til navnið á Andrassi Róin, Reidar Nónfjall, Niels Juel Arge ella onkran annan av fáu monnunum í vælkendu stjóra-rotatiónspressuni her á landi.

Men hetta er kanska júst